# Fútin ger einki við homoFObia

**Fútin metir ikki grundarlag vera fyri at ákæra Ole Wich fyri at hava misbrúkt Merkið, og tí verður ikki meira gjørt við málið**

MENTANARSTRÍÐ
*Theodor E. D. Olsen*




Herfyri varð nógv kjakast um listamannin Ole Wich, eftir at hann hevði tvinnað Merkið saman við orðinum “homoFObia”.

Hetta dámdi ikki Bill Justinussen, løgtingsmanni fyri Miðflokkin, sum í almennum brævi heitti á fútan um at reisa ákæru ímóti Ole Wich.

Men eins og fútin ikki metti tað vera grundarlag fyri at ákæra Mogens Tilsted Christensen, hvalvíkarprest, fyri at hava mælt til, at samkynd ikki kunnu fáa størv sum lærarar og námsfrøðingar, verða listaverkini hjá Ole Wich heldur ikki mett sum lógarbrot.

Av Fútaskrivstovuni verður sagt, at tey sjálvsagt hava lisið áheitanina hjá Bill Justinussen í bløðunum, men at hetta verður mett sum eitt mentanarpolitiskt kjak, ið tey ikki vilja leggja seg útí.

Ole Wich er tó ikki tann einasti listamaðurin í danska ríkinum, sum í hesum døgunum verður vigaður av løgregluni. Herfyri varð danski filmsleikstjórin Lars von Trier meldaður til politiið, eftir at hann í einum sjónbandi hevði klipt tann hvíta krossin úr Dannebrog, og síðani seymað tey reyðu pettini samanaftur til eitt reytt flagg, meðan “Internationali” varð spældur. Hetta gjørdi hann, av tí at ein av hansara filmun varð valdur at vera við í tí sonevndu mentanarkanonini, sum danski mentamálaráðharrin Brian Mikelsen setti í verk.


SUDOKU JANUAR KAPPING

Seinasta freist at senda okkum loysnirnar er 3. februar 2006



Vinningurin er ein Samsung E730
+ eitt Teletíðarhald frá Føroya Tele.
Virði 3.295 kr.

Henda fartelefonin hevur so at siga alt sum skal til í eini fartelefon. Megapixel-kamera, video, MP3, Bluetooth, FM-radio, 96 Mb minni v. m. Eisini hevur E730 ein TFT-skerm við 262.000 litum.

FØROYA TELE

Sosialurin Tórsgøta 1 · P.O. Boks 76 · FO-110 Tórshavn · Tel 34 18 00
Fax 34 18 01 · post@sosialurin.fo · www. sosialurin.fo
miðlahúsið í Vágsbotni



Farmaleiðir

Vit flyta

**Mánadagin 6. februar 2006 verður frankeringin og móttøkan av farmi hjá Farmaleiðum í Tórshavn flutt niðan á Hjalla 4 (har verkstaðurin hjá Farmaleiðum er).**

Allur farmur skal hereftir handast á Farmaleiðum á Hjalla 4, tó undantikið farmur sum skal til Suðuroyar, Nólsoyar, Skúvoyar og út í Hest, sum framvegis kann avgreiðast á bryggjuni í Tórshavn.

Farmur skal verða okkum í hendi á Hjalla innan kl. 08.30, tó til Suðuroyar kl. 15.00, fyri at koma við sama dag.

Avgreiðslutíðirnar á bryggjuni og á Hjalla eru frá kl. 8.00–16.00 mánadag–fríggjadag.

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.ssl.fo

REPROZ






HANDVERKARI / ARBEIÐSMAÐUR

Vit sóknsast eftir handverkara, ella arbeiðsmanni við royndum innan handverk, at byrja skjótast tilber á plastframleiðsluni í Miðvági

Vit bjóða:
- eitt spennandi starv
- tryggar arbeiðsumstøður
- gott arbeiðsumhvørvi

Løn:
- løn sambært avtalu

Vit vænta av tær:
- at tú ert ágrýtin og nærlagdur
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni
- at tú ert fyrikomandi og álítandi

Nærri fæst at vita við at venda sær til Dánjal Paula á tel. 21 27 89 ella á dp@hdygd.fo

H DYGD

Í Geilini 2 | FO-385 Vatnsoyrar | Tel.: +298 332177 | www.hdygd.fo | post@hdygd.fo

*Føroya Gluggi pf. og Vatnsoyra Snikkaravirki pf. eru systurfeløg, og hava felags navn og umsiting. Vit framleiða vindeygu og hurðar úr plasti og timburi. Í løtuni eru vit 24 starvsfólk, harav 8 eru í plastframleiðsluni.*

REPROZ